# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

Meira um bilaframsýningina á Giljanesi sum kykmyndir (videoklipp) á portalinum




*FS Vágar skipaði fyri bilasølustevnu í høllini á Giljanesi í vikuskiftinum 28. og 29. oktober*

# Fleiri nýggjheitir á bilasølustevnu

**Í vikuskiftinum skipaði ítróttarfelagið FS Vágar fyri bilasølustevnu í høllini á Giljanesi. Yvir 50 bilar vóru á framsýningini, har ímillum onkrar spennandi nýggjheitir**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Eins og undanfarin ár skipaði FS Vágar fyri bilasølustevnu í høllini á Giljanesi. Stevnan var hesaferð í vikuskiftinum 28. og 29. oktober.

Framsýnarar á stevnuni vóru bilasølurnar: Reyni Service, Auto Service, Norðbil og Nordcar. Hesar bilasølurnar selja 11 ymisk bilmerkir, og á framsýningini vóru yvir 50 nýggir bilar sýndir fram.

Tær mest spennandi nýggjheitirnar vóru ivaleyst ársins bilur í Danmark 2007 Opel Corsa og Honda Civic, ið er ein rættuliga sermerktur bilur. Eisini var nýggjasti Lexus IS220 diesel, og seks persónabilurin Honda FR-V við trimum sitiplássum framman og trimum aftan.

Umframt bilaframsýningina var tónleikur og nýggjasti klæðna-, skógva- og hármótin sýndur fram.




*Ársins bilur í Danmark 2007 Opel Corsa. Sum eykaútgerð fæst Corsa við innbygdum súkklusativi til tvær súkklur.*





*Yvir 50 nýggir bilar vórðu sýndir fram. Fremst nýggi Toyota Yaris*




*Nýggi Honda Civic er ein rættuliga sermerktur bilur, bæði uttan og innan*